**Tíðargreinin: eitt íkast til føroyska orðaskiftið**
Hevur tú hug at gera títt íkast til føroyska kjakið í 2008?
Send eina grein til dorit@sosialurin.fo
Kravið er, at greinin er millum 8.000 og 10.000 tekn og skrivað í essay stíli

**Næsta tíðargreinin** kemur longu í morgin.
Søren Bruhn: Eru vit komin á eggina?

# Nógv egg í fleiri kurvar



TÍÐARGREININ
*Annika Sølvará, stjóri í Granskingarráðnum*

Játtan til gransking er ein langtíðar íløga, sum kastar vitan av sær. Vitanin kann ítøkiliga geva fíggjarligt avkast innan vinnuna ella kann brúkast til tiltøk innan heilsu-, útbúgvingar-, umhvørvis- og onnur verk til at skipa og menna samfelagið.

Í hesum døgum er freistandi at halda, at tað er við gransking sum við veðrinum: Øll tosa um tað, men eingin ger nakað við tað. Hetta er nú ikki allur sannleikin, tí tað verður sanniliga granskað í Føroyum – langt frá nokk, men hóast alt ikki so lítið. Tað verður enntá granskað í veðrinum, og hvussu mann kann gera nakað við tað. Granskingin í havinum og ávirkanini frá veðurlagsbroytingunum er millum sterkastu og mest týðandi granskingina, vit hava í Føroyum í dag. Grundirnar eru minst tvær: Onnur er, at vit hava góð fólk her, sum hava fingið møguleikan at útbúgva seg, arbeiða og menna seg innan økið, sum tey hava brennandi áhuga í, hin at tað verður satsað uppá økið – les: peningur er latin til endamálið, í stóran mun frá útlendskum stuðlum.

Høvdu vit dyrkað og satsað líka munadygt á øðrum økjum eisini, høvdu vit kunna livað upp til fínu visiónirnar, sum vit tosa so nógv um. Her beint undan løgtingsvalinum við álvarsorðum um at satsa uppá gransking í aðruhvørjari grein, havi eg hug at siga, at nú er nokk tosað, nú er at gera nakað við tað.

## Hagtølini tala

Granskingarráðið kunngjørdi í summar hagtøl fyri gransking, menning og nýskapan í Føroyum. Hetta eru best skjalprógvaðu upplýsingarnar, vit hava tøkar um føroyska gransking sum heild.

Tølini siga nakað um fígging, býti millum granskingarøkir og ymiskt annað. Talan er um eina teljing, sum sigur mest um, hvussu nógva orku vit brúka, hon sigur ikki nakað beinleiðis um úrslitini. Kortini kunnu ávísar niðurstøður gerast burturúr, serliga um, hvat avkast Føroyar kunnu rokna við at fáa við at hyggja upp á, hvussu nógv verður satsað uppá ymsu økini. Í stuttum kann sigast, at tað eru fá øki, sum í dag eru nóg sterk til at vit kunnu rokna við serliga stórum avkasti.

## Politisk plussorð uttan kjøt

Hóast nógv politiskt tos um gransking og eftirlýsingar eftir haldgóðum upplýsingum um gransking, hava nýliga framløgdu hagtølini ikki verið serliga nógv viðmerkt ella viðgjørd í politiska rúminum ella í miðlunum.

Her verður ein roynd gjørd at fara aftur um tølini og spyrja, hvør granskingin er, sum verður uppsummerað í fínar lagkøkur og stabbar. Hvar og hvør granskar? Kunnu vit rokna við at fáa nakað burturúr? Hvat kunnu vit brúka tað til?

## Granskingarumhvørvið

Stórur partur av granskingini fer fram á almennum stovnum, sum flest allir hava til endamáls at granska og gera onnur ting eisini. Umframt hesa granskingina fer ein munandi partur av granskingini í Føroyum fram við stuðli frá Granskingarráðnum og øðrum fíggjarligum keldum. Her er ofta talan um granskingarætlanir burturav, sum fara fram á almennum stovnum í Føroyum og uttanlands ella í samstarvi við vinnuna. Í rundum tølum verður roknað við, at parturin, sum Granskingarráðið fíggjaði í 2003, var umleið 8 % av almennu játtanini til gransking og menning. Samlaða fíggjarlógarjáttanin til gransking og menning var 63.7 mió ella 0,66% av BTÚ, meðan vinnan brúkti 20.6 ella 0,21 % av BTÚ.

Nógv mesta føroyska almenna granskingin er innan náttúru og náttúrutilfeingi, heili 63%. Tað er eyðsæð, at granskingin á øðrum økjum er sera smábýtt og tí eru umhvørvini ofta viðbrekin og persónstengd. Hetta verður vanliga hildið at vera sera óheppið, tí uppbygd vitan kann hvørva sera knappliga og tekur langa tíð at byggja uppaftur.

## Leikluturin hjá Granskingarráðnum

Granskingarráðið varð sett á stovn í 1996, og fyrstu játtanirnar til gransking vóru eftir tilmæli frá nýggja ráðnum latnar í 1997. Fyrstu tíðina var játtanin sera avmarkað og bert fyri eitt ár í senn. Seinni varð lógin umskipað, Granskingargrunnurin stovnaður, Granskingarráðið fekk játtanar- og eftirlitsmyndugleikan og játtanin øktist nakað. Síðani 2002 hevur játtanin kunnað verið latin til verkætlanir yvir fleiri ár og tøka upphæddin er vaksin nakað, um enn hon enn er forsvinnandi lítil í mun til ynskir og tørv. Í 2003 var tøka játtanin á fíggjarlógini 5.2 mió kr., í 2007 6.7mió kr. Hørð kapping er um hesar pengarnar, tí øll árini eru komar 4-5 ferðir so nógvar skikkaðar og viðkomandi umsóknir, sum játtan hevur verið tøk til.

## Vinnugransking

Eitt av mest brúktu orðunum í teimum mongu álitunum um gransking seinnu árini er vinnugransking. Hetta er lykilin til gransking í Føroyum, nú skal gransking gagna vinnuni og harvið samfelagnum. Jú, sjálvsagt, men hevur gransking ikki altíð gjørt tað? Tað er eftir mínum tykki sum við hønuni og egginum. Hvat kom fyrst? Hvar gongur markið fyri vinnuligari nyttu av gransking ella er nakað mark yvirhøvur?

Av teimum verkætlanunum, sum Granskingarráðið hevur stuðlað seinnu árini vilja flestu vera samd um, at eitt nú gransking í upptøkuni av dixocin, PCB og øðrum evnum í alilaksi, sum Magnus Pauli Magnussen hevur gjørt á Havsbrún er vinnugransking. Eisini er menning av flóðlinju við atliti at hygieiniskum sniði og arbeiðumhvørvi, sum Jákup Magnussen á NomaTek hevur arbeitt við, og blóðgiskipan til blóðuppsamling, sum Rógvi Nielsen hevur gjørt hjá NomaTek og VestSalmon beinleiðis vinnuvent arbeiði.

Fleiri aðrar áhugaverdar og lovandi verkætlanir úr einum vinnusjónarhorni eru um at vera lidnar ella eru væl í gongd. Ólavur Simonsen o.a. kanna møguleikan hjá skipum at spara olju. Bjarti Thomsen og Fróði Skúvadal arbeiða við eini verkætlan um stórmeskað flótitrol. Hilmar Simonsen o.a. arbeiða við kanningum og tulkingum av seismiskum data frá Glyvursnesi og Vestmannasundi.

Men hvussu við stóru kanningini hjá Katrini Næs av lesiførleikanum hjá føroyskum skúlanæmingum? Er hetta vinnugransking? Í øllum førum kunnu úrslitini væntandi geva okkum svar uppá onkrar av spurningunum, sum eru reistir í Pisakanningunum, og loysnir sum í framtíðini kunnu koma vinnuni og samfelagnum øllum til góðar. Og hvussu við kanningunum hjá Beintu í Jákupsstovu og Bjørg Jacobsen av broyttu kynsmynstrunum. Tær stóðu fyri føroyska partinum av norðurlendsku verkætlanin Women leave, men remain, har umstøðurnar hjá kvinnum í Útnorðuri vóru kannaðar. Ein av trupulleikunum er, at kvinnur í alt størri mun søkja móti stórplássunum, í føroyskum viðurskiftum til Havnar og uttanlands. Hetta skapar eitt álvarsligt undirskot av kvinnum í samfelagnum, júst tann trupulleikin, sum Jákup á Dul gjørdi vart við á nýggjárinum.

## Vinnan yvirhálar Visión 2015

Hóast stórar politiskar ambitiónir við Visjón 2015 varð talan ikki um nakað beinleiðis

*Framhald á næstu síðu*




*Í hesum døgum er tað vinnan, sum gongur á odda at vísa á tørvin og eftirlýsir einum sterkum og umfatandi universiteti í Føroyum. Hetta hava Fróðskaparsetrið og granskingarstovnarnir eisini víst á í fleiri ár, uttan at tað er eydnast at sannføra politisku skipanina um, at stórar íløgur er fyrsta og største fyritreytin*